Men henda víkingastevnan er í januar.

— Er tað ikki kalt at halda stevnu tá?

— Vit eru jú víkingar for ólukkan, flennir Mr. Mullay.

Líkt er heldur ikki til, at teir kenna so heilt lítið til Føroyar. Onkur teirra nevnir gamla fótbóltssamstarvið millum føroyingar og hetlendingar, meðan onkur annar nevnir Dr. Jacobsen, sum gjørdi vísindaligt arbeiði um norrøna ávirkan og orð í hetlendska málinum.

Men serliga Noreg dregur. Hetlendingar hava eisini gjørt stórt arbeiði at fáa skandinavar til Hetlands at ferðast.

Ikki so nógv sum væntað

Hvussu er so áhugurin at ferðast á Hetlands-Noregs-rutuni?

Stjórin á Smyril-Line, Óli Hammer, fjalir ikki, at felagið er ikki nøgt við umbiðingarnar á farleiðini Noreg, Hetland og Føroyar og úr Føroyum til Hetlands og Noregs.

Umbiðingarnar eru nógv færri enn Smyril-Line hevur roknað við, hóast tær fleiri enn samlaðu ferðingarnar í fjør.

Men, sum vist verður á, so er hetta eitt nýtt tiltak í Hetlandi og henda rutan skal sjálvandi eisini innarbeiðast.

jo-mo



Vøtnini eru nógv í tali. Eingin kampingplúss eru. Hinvegin er alt Hetland eitt kampingplúss, sigur Maurice S. Mullay, ferðafólkastjóri. Tað vil siga tað sama sum at tjaldast kann allastaðni í náttúruni, har tað ikki er til ampa

Nógvir møguleikar eru fyri sílaveiði. Vøtnini eru yvir 300 í tali, men nógv teirra eru smá, mest lík tjarnum. Hetlendingar siga, at nógv er til av sílum. Teir fiska við flugu men eisini við maðki, makreli og øðrum agni. Sílaveiðifelagið í Hetlandi, The Shetland Anglers Association,ið er nokur og 60 ára gamalt, hevur fiskirættindini á nógvum av vøtnunum. Tað er bíligt at keypa fiskikort, og sílaveiðifelagið hevur latið gera ein bókling yvir meira enn 100 vøtn

Smyril-Line er ikki nøgt við bíleggingarnar á Noregsrutuni. Kortini eru bíleggingarnar fleiri í ár enn samlaðu ferðingarnar seinasta summar. Reiðarin á Norrønu, Óli Hammer, prátar við norðmann, áðrenn Norrøna heldur leiðina úr Bergen

Framhald av síðu 3

matstovum, tá fólk kanska kundi hugsað sær eitt glas av víni aftur við einum góðum døgurða.

Annars verður upplýst, at í meðal stedga ferðafólk ikki meira enn í eina til tvær vikur í Føroyum.

jo-mo

Map Reference C5



Sand – 2 Chalets.
ACCOMMODATION: 1 Public Room, 2 Bedrooms sleeping 4.
OPEN: January to December.
PRICE PER WEEK: £30 to £35.
Conforms to Standards.

ADVANCE BOOKINGS TO: **Mr. P. A. Hick, 'The Haa', Sand Garderhouse. ☎ Reawick 284/261.**

Map Reference B6

Bayview, Bridge of Walls – 1 Cottage.
ACCOMMODATION: 1 Public Room, 2 Bedrooms sleeping 4.
OPEN: January to December.
PRICE PER WEEK: £60.
Conforms to Standards.

ADVANCE BOOKINGS TO: **Mrs. A. Shearer, 20 Burgh Road, Lerwick. ☎ Lerwick 2562.**

Map Reference B6

Bridge of Walls – 2 Flats.
ACCOMMODATION: 1 Public Room, 1 to 2 Bedrooms sleeping 4 to 6.
OPEN: January to December.
PRICE PER WEEK: £20 to £50.
Conforms to Standards.

ADVANCE BOOKINGS TO: **Mrs. A. Hobbin, Bridge of Walls House. ☎ Walls 208.**

Ein gistingarháttur, ið hevur vundið nógv upp á seg, eru smáir tur og summarhús. Kostnaðurin er ógvuliga ymiskur. Úr 20 upp í eini 120 pund fyri eina viku

Lassin á Strondum

Tú lá ikki og svav døgverðarnar burt
— tú var í vinnu —
Tá ið tað eftir tær var spurt.

Arbeiddi net og laðaði garð
— var á floti —
tá ið ein glotti var.

Nú søkir tú ei hagan
— ei heldur høv —
Nú er lívssólin farin um Nøv.

At lívskvøldið má gerast blítt
— ja Guð gævi —
Harrin tær fylgi og løni tær
fyri dagliga strevið.

J. J. í Gerði

Follend prestur

Tolin og treystur
var tú holli bróður
Ei ein dansur á rósum
var tín lívsróður.

Tú mátti her líða
sorg og súrt.
man Harrin gav tær treysti
til at halda út.

Væl hevur tú arbeitt
í Harrans víngarði
Øld eftir øld
ein glógvandi minnisvarði
— Serstøk heilsan

J. J. í Gerði